# Vit skulu síggjast og hoyrast betri

**Johan Dahl sigur, at hiðani og til komandi løgtingsval má sambandsflokkurin verða sjónligari í samgonguni**

SAMBANDS-
FLOKKURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Sambandsflokkurin skal vera sjónligari í føroyskum politikki.

Tað sigur Johan Dahl, løgtingsmaður, sum nú er komin upp í aftur sambandsflokkin.

Hann vendi annars flokkinum baki fyri nøkrum vikum síðani, eftir at hann hevði tapt formansvalið, ímóti Kaj Leo Johannesen.

Men í gjár kunngjørdi hann, at hann aftur umboðaði sambandsflokkin.

– Vit hava tosað um viðurskiftini og eru samd um, at hetta er tað besta fyri flokkin, sigur hann.

Tá ið hann meldaði seg úr flokkinum, var tað tí, at hann metti, at flokkurin hevði mist álitið á honum við ikki at velja hann til formann og samstundis hevði hann mist álitið á flokkinum, tí hann ein meiriluti hevði lovað at velja hann til formann.

Men Johan Dahl sigur, at síðani hann meldaði seg úr flokkinum, hava fleiri valdømi skrivliga heitt á hann um at umhugsa støðuna av nýggjum.

– Eg haldi at tað vóru øll valfeløgini hava heitt á meg um at koma upp í aftur flokkin og tað hevur hann so tikið til eftirtektar.

Hann sigur, at hetta fekk hann at hugsa um flokkin og tey fólkini, sum hava stuðla hann.

– Sostatt hava vit gjørt av at royna einaferð afturat og vit hava lovað hvørjum øðrum, at allir partar skulu royna at fáa tað at rigga betri hesuferð

– Vit eru samd um, at lata tað farna vera farið og at líta frameftir.

Hann ivast ikki í, at hetta er tað besta fyri sambandsflokkin og fyri sambandspolitikkin.

Johan Dahl sigur, at tað eru ongar serligar treytir ella serligar avtalur gjørdar, fyri at hann nú aftur er komin upp í sambandsflokkin.

Tað eru heldur ongar broytingar gjørdar.

Kortini leggur Johan Dahl dent á, at tað, sum nú er hent, er bara galdandi hetta valskeiðið.

Hann sigur, at hann hevur ikki gjørt av, hvat hann ger, tá ið løgtingsval verður aftur, ella um hann stillar upp aftur yvirhøvur.



*– Eg havi fingið nógvar áheitanir um at koma upp í aftur sambandsflokkin og tí havi eg hugsað meg um av nýggjum, sigur Johan Dahl, sum nú aftur er sambandsmaður*

### Skal vera sjónligari

Tað er heldur ongin loyna, at tú hevur ikki havt serliga stórt álit á Kaj Leo Johannesen sum formanni, tí tí hevur hildið, at sambandsflokkurin hevur ikki fingið nóg nógv burturúr í hesi samgongunii?

– Tað er rætt. Eg havi hildið, at flokkurin hevur verið ov lítið sjónligur. Men serliga nú løgtingsval verður aftur í seinast lagi um hálvtannað ár, verður tað neyðugt, at fera flokkin meiri sjónligan.

Johan Dahl heldur, at skal sambandsflokkurin tryggja sær eina sterka støðu eftir eitt komandi val, er tað neyðugt, at flokkurin ger meiri vart við seg í samgonguni.

Men, hvussu tað skal gerast, vil hann ikki siga nakað um.

Hann sigur, kortini, tað má vera allur flokkurin í felag, sum skal markera flokkin og sostatt er tað formaðurin, sum skal stinga kósina út í kortið.

Men hann sigur, at innanflokks hevur sambandsflokkurin tosað um hesa støðuna .

---

# Tað var gott at fáa Johan Dahl aftur

**- Hann er ótrúliga raskur, men hann fyllur eisini nógv, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í sambandsflokkinum**

SAMBANDS-
FLOKKURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er gott at vera fullmannaður aftur!

Tað ásannar Kaj Leo Johannesen, formaður í sambandsflokkinum, nú tað er greitt, at Johan Dahl aftur er limaður inn í sambandsflokkin á tingi.

Sum floksformaður er tað altíð harmiligt at missa av liðnum, men líka gott er tað at fáa liðið fullmannað aftur.

Formaður sambandsfloksins sigur, at tað eru ongar serliga avtalur gjørdar fyri at fáa løgtingsmannin aftur í rætt.

Men hann sigur, at tey hava tosað um støðuna.

– Vit hava vent hvørjum steini og eru samd um, at hetta er tað besta fyri allar partar, sigur Kaj Leo Johannesen. Samstundis eru vit samd um, at gloyma fortíðuna og um at hyggja frameftir ístaðin.

Hann ásannar, at tað er ein stór styrki fyri sambandsflokkin at fáa Johan Dahl upp í flokkin aftur.

– Hann er ótrúliga raskur og hann dugir sera væl at gera vart við sjónarmiðini hjá flokkinum. Men samstundis er ikki yvir at dylja, at Johan Dahl fyllir nógv og krevur nógv rúm, har hann er og sostatt krevur hann nógv pláss á liðnum.

– Men tað er sjálvsagt mín uppgáva at fáa tað besta fram í hvørjum einasta tinglimi og tað fari eg framhaldandi at royna.

### Fáa nógv burturúr

Men sum tað sæst í hinari greinini, heldur Johan Dahl, at Sambandsflokkurin fær ov lítið burturúr og at flokkurin skal markera seg meiri, skal hann hava møguleika at standa seg væl á einum komandi løgtingsvali.

Men her er floksformaðuri ósamdur. Og hann sigur, at tingmanningin er eisini ósamd.

– Eg haldi, at vit eiga bróðurpartin í samgonguskjalinum og tey fremstu av okkara hjartamálum eru loyst, ella eru í ferð við at verða loyst.

Kaj Leo Johannesen nevnir einskiljingarnar, sum nógv hava tosað um, men sum gongd nú er komin á. Hann nevnir eisini, at ríkisfelagsskapurin er dagførdur og at ES er aftur sett á breddan í almenna kjakinum í Føroyum.

– Hetta eru øll hjartamál hjá sambandsflokkinum, sum vit hava lagt dent á og sum nú eru framd, ella eru um at verða framd, sigur formaðurin í sambandsflokkinum.

Tí sigur formaðurin, at tað eru ongar avtalur gjørdar um serliga mál, sum flokkurin skal markera seg við fyri at fáa Johan Dahl upp í flokkin aftur.

– Johan Dahl er ein av sjey tinglimum og hann er hvørki meiri ella minni verdur enn nakar annar og tí skal hann heldur ikki hava nakra serviðgerð í flokkinum, sigur Kaj Leo Johannesen.



*– Johan Dahl hevur ikki rætt í, at vit hava fingið ov lítið burturúr, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður sambandsflokkinum*

Men vit gleða okkum til eitt framtíðarsamstarv, har vit øll hava ábyrgdina av hvørjum øðrum, leggur hann afturat.

Hann vísir eisini á, at sjálvandi kunnu øll ikki vera samd um alt, men ósemjur eiga í størri mun at verða viðgjørdar innanfloks, tí tað ringasta fyri ein flokk er leypa á hvønn annan í fjølmiðlunum.